# Ein breiður motor-vegur undir jørð



FARICE-kaðalin kemur upp á land í Funningsfirði.

**FARICE-kaðalin er veruleiki. Breið-bandið hjá Føroya Tele, ið byggir á ADSL, er munandi styrkt, tí atgongdin, støðufesti og skjótleikin á internetinum eru fleirfaldað eftir einum degi**

Vit hava fingið ein fleirsporaðan samskiftismotorveg til umheimin, sum gongur líka av meginlandinum til tað einstaka virkið og húskið í Føroyum.

FARICE-kaðalin, sum er lagdur millum Skotland, Føroyar og Ísland, er nevniliga fyrst og fremst ein munagóður bati á okkara uttanlandssamskifti, og hann er ein fleirfalding av ferðini og orkuni á internetsambandinum hjá Føroya Tele umvegis ADSL.

I-net Breiðband frá Føroya Tele nýtir ADSL-breiðbandstøkni, ið arbeiðir nógv skjótari enn bæði ISDN og analogt samband. Sostatt gevur ADSL, sum stendur fyri Asymmetric Digital Subscriber Line, heilt nýggjar nýtslumøguleikar av interneti.

I-net Breiðband frá Føroya Tele er ein munandi tryggari tænasta enn t.d. tráðleyst samband. Talan er um eina fasta linju, ið gongur gjøgnum koparnet undir jørð. Skipanin hevur eina stak høga uppitíð, tað vil siga, at hon er sera sjáldan óvirkin, og so er hon mestsum ógjørlig at avlurta. Tað er eisini ein avgjørdur fyrimunur, at tær ikki nýtist at ringja upp fyri at fáa samband.

## Styrktur ryggur

Við nýggja FARICE-kaðalinum er ryggurin í internet-sambandinum hjá Føroya Tele vorðin munandi styrktur. Tað gevur fyrst og fremst meira kapasitet til krevjandi kundar, og ítøkiliga merkist tað við, at størri mongdir av data kunnu sendast, og tað verður skjótari at heinta og surfa á internetinum.

Harafturat økist tryggleikin munandi, tí sambandið hevur fingið ein bakverja. Brýtir FARICE saman, so tekur gamli Cantat-kaðalin yvir. Sostatt er altíð samskifti við umheimin umvegis kaðal, áðrenn var einasta samskiftið við umheimin satelittsamband, tá ið Cantat var óvirkin.

Føroya Tele hevur nøkur av teimum sterkastu fólkunum at arbeiða við interneti, og tað er ein stórur fyrimunur hjá virkjum. Hildið verður eisini eitt vakið eygað við netinum. Um ein kundi hjá Føroya Tele verður útsettur fyri teldusníkum, verður netið stongt beinanvegin, so skaðin verður forðaður ella í ringasta føri avmarkaður.

I-net Breiðband verður bjóðað við ymsum linjuferðum, sum fáast í ymiskum prísum. Tað vil siga, at eitt virki, sum fær sær I-net Breiðband frá Føroya Tele, kann tillaga skipan og prís eftir tørvi.

## Samnet til virki

Ein onnur hent tænasta til vinnukundar hjá Føroya Tele er Samnet. Samnet byggir á tøkni, ið avbyrgir flutningin hjá fyritøkuni frá øðrum flutningi hjá Føroya Tele - eisini internetflutningi. Við hesum verður eitt egið net stovnað sum ein afturlatin brúkarabólkur á IP-netinum.

Fyrimunirnir við Samneti eru fleiri: Tað hóskar væl til størri net við nógvurm deildum breiddar út á ymisk øki. Fyritøkan fær gagn av tí høgu rakstrartrygdini á netinum hjá Føroya Tele. Tað er skjótt og lætt at binda í. Høgar og smidligar linjuferðir. Og verandi adressur kunnu brúkast á nærnetunum.

Samnet gevur stóran smidleika. Fólk kunnu eitt nú arbeiða heima við serligum uppgávum, ella tí børn eru sjúk. Eingin munur er at sita heima og til arbeiðis, tí tú koblar teg beinleiðis á netið hjá virkinum.

FØROYA TELE
Stovnað: 1906
Stjóri: Andras Róin
Starvsfólk: 257
Virkisøki: Fjarskifti





I·net
INTERNETLOYSNIN

Nýggi Farice-kaðalin er farin at virka og samskiftið við útheimin gongur nú munandi skjótari og tryggari. Við lægri prísi, skjótari ferð, álítandi og tryggari tænastu kunnu vit bjóða fyritøku tykkara I·net Breiðband Vinnuligt, har tit altíð hava samband við sera skjótum interneti við útheimin. Við fleiri møguleikum kunnu vit seta ferð og mongd saman eftir tørvi og krøvunum hjá fyritøku tykkara.

Lat vinnudeild okkara ráðgeva og hjálpa tær at finna røttu og bestu loysnina til tykkara fyritøku. **Tíð er peningur og tí er nógv at spara...**

FØROYA TELE




UTTAN ÚR HEIMI

# Gíslarænarar sjónbandaðu avrættingina

**Ein italskur gísli varð tikin av døgum í Irak gjáranáttina. Avrættingin bleiv tikin upp á sjónband**

AVRÆTTING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Vit hava upptøkuna, men vit fara ikki at vísa hana, tí hon er alt ov ógvuslig, sigur talsmaðurin hjá arabisku sjónvarpsstøðini Al Jazeera við tíðindastovuna Reuters.

Tað var eisini Al Jazeera, sum bar tíðindini um, at gíslarænararnir í Irak høvdu avrættað ein av teimum fýra italsku monnunum, sum vórðu burturfluttir seinasta vikuskiftið. Gjáranáttina váttaði italska stjórnin, at hon hevði fingið prógv fyri, at ein av gíslunum, Fabrizio Quattrocchi, var vorðin avrættaður.

Frammanundan høvdu gíslarænararnir boðað frá, at teir fóru at avrætta gíslarnar, tí italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, hevði gjørt greitt, at Italia fer ikki at taka sínar hermenn úr Irak. Gjáranáttina endurtók hann, at Italia fer ikki at leypa frá givnum lyftum nú, men at teir 3.000 hermenninir verða verandi í Irak.

Um tað fer at kosta hinum trimum italsku gíslunum lívið er ikki greitt, men boðskapurin frá burturflytarunum er í hvussu er greiður:

– Vit fara at drepa teir, ein fyri og annan eftir. Vit vita, at teir hava arbeitt fyri tað amerikanska hersetingarvaldið, stóð í boðunum frá gíslarænarunum.

Útlendskir eygleiðarar stúra fyri lagnuni hjá teimum umleið 40 útlendingunum, sum sita gíslar hjá ymsum irakskum bólkum. Summir bera ótta fyri, at avrættingin gjáranáttina var bara tann fyrsta.

# Bush boygdi seg fyri Sharon



*Ariel Sharon, forsætisráðharri, fekk nógv burtur úr vitjan síni í Washington fyrradagin. Eygleiðarar eru samdir um, at USA nú hevur broytt sín politikk í Miðeystri, og at tað fer at gera tað truplari at fáa frið ímillum ísraelsmenn og palestinar*

*Mynd: Reuters*

**USA góðtekur nú ísraelska kravið um at varðveita nakrar av teimum jødisku niðursetubygdunum á Vestara Áarbakka, sjálvt um palestinar siga, at tað beinir fyri øllum ætlanum um frið**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Avgerðin hjá George W. Bush, forseta at góðtaka nakrar av niðursetubygdunum á Vestara Áarbakka kom ikki óvart á eygleiðarar, tí longu undan vitjan Ariel Sharons í Washington bleiv víst á, at í einum valári er amerikanski forsetin vanliga sinnaður at toyggja seg langt fyri at gera Ísrael eftir vild.

Men avgerðin hjá Bush boðar frá einari rættiliga stórari broyting í amerikanska politikkinum, tá tað snýr seg um at fáa frið ímillum ísraelsmenn og palestinar. Higartil hevur USA hildið uppá, at niðursetubygdirnar, sum eru uttan fyri markið, sum Ísrael hevði undan seksdagakrígnum í 1967, forðaðu fyri einari friðarligari loysn í Miðeystri. Nú sigur Bush, at viðurskiftini eru broytt, og at tey broyttu viðurskiftini mugu takast til eftirtektar.

Amerikanski politikkurin hevur verið, at ísraelska landamarkið skal flytast, tá tað palestinska ríkið verður stovnað. Amerikanskir embætismenn søgdu aftan á fundin ímillum Bush og Sharon, at semjan teirra millum líkist einum uppskoti, sum stjórnin hjá Bill Clinton gjørdi, tá hon í 2000 tingaðist við Yasser Arafat, forseta og táverandi ísraelska forsætisráðharran, Ehud Barak.

Harvið hevur USA góðtikið ísraelska kravið um at varðveita fimm niðursetubygdir við næstan 100.000 íbúgvum á Vestara Áarbakka sum ein part av ísraelska ríkinum.

Palestinskir leiðarar ávaraðu undan fundinum í Washington Bush ímóti at slaka fyri ísraelska kravinum. Ahmed Qurie, forsætisráðharri, segði, at palestinar fara ikki at sleppa kravinum um allan Vestara Áarbakka og partar av Jerusalem. Bæði Qurie og Yasser Arafat, forseti, søgdu, at slakaði USA, er tað tað sama sum at geva teirri seinastu friðarætlanini mønustingin.

# Schrøder steðgaði bók um kanslaramorð

**Týski kanslarin hevur fingið dómsvaldið at steðga einari nýggjari bók, ið er um ein mann, sum myrðir ein týskan kanslara.**

BÓKAÚTGÁVA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað var nú ikki bara innihaldið, sum fekk Gerhard Schrøder at seta seg upp ímóti, at bókin "Endi kanslarans - tað seinasta skotið" kom út. Á permuni var ein mynd av einum manni, ið skuldi ímynda kanslaran í søguni, og sum í roynd og veru eisini líktist Gerhardi Schrøder rættiliga nógv.

Tað vildi kanslarin ikki góðtaka, og hann hevur nú fingið dómsvaldið at steðga útgávuni. Forlagið hevur tí verið noytt at taka bókina aftur, men sigur, at ætlanin er at geva bókina út við einari aðrari permu.

Í bókini verður ein týskur kanslari skotin uttan fyri jarnbreytastøðina í býnum Hannover. Høvundurin nevnir seg Reinhard Liebermann, men sambært BBC er tað ein týskur tíðindamaður, sum hevur skrivað bókina undir dulnevni.